# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit halda áfram at leita eftir Maddie, til vit fáa vissu fyri, at hon ikki er á lívi longur (Kate McCann)*

## Eitt ár síðani Madeleine hvarv

Í morgin er eitt ár, síðani Madeleine McCann hvarv av einum hotelli í Portugal. Árið hevur verið sum ein ræðufilmur, sigur Garry McCann

-Hon er á lívi onkunstaðni, og vit biðja øll hjálpa okkum at finna hana, segði Gerry McCann.

-Vit fara at leita, til vit fáa prógv fyri, at hon ikki er á lívi longur. Tað skylda vit Madeleine, skoytti Kate McCann uppí, tá bretska sjónvarpið BBC hitti tey bæði í sambandi við, at eitt ár er liðið, síðani dóttir teirra hvarv í Algarve í Portugal tann 3. mai í fjør.

Í samrøðuni við BBC greiddu tey bæði frá, at tey hava fingið fleiri brøv frá fólki, sum leggja tey undir bæði líkt og ólíkt í sambandi við, at Madeleine hvarv. Tey hava eisini fingið brøv frá fólki, sum siga seg síggja meiri enn onnur, og fleiri hava eisini skrivað, at tað var skeivt av teimum at lata børnini vera einsamøll eftir á hotellinum vanlukkukvøldið. Garry McCann hevði tikið eitt av brøvunum við sær:

-Dóttir teirra doyði, tí tit hugsaðu bara um tykkum og at hugna tykkum. Skammið tykkum. Vónandi fara tit at líða allar tykkara dagar, stóð millum annað í brævinum.

-Hjá okkum hevur hetta árið verið sum ein ræðufilmur, sigur Gerry McCann við BBC.



*Garry og Kate McCann í samrøðu við BBC í gjár*

*Mynd: Polfoto*



*Madeleine McCann er í dag fýra ár, um hon er á lívi*

*Mynd: Polfoto*

## Bush á botni



Eingin amerikanskur forseti hevur havt so lítla undirtøku millum amerikanararnar sum George W. Bush

Harry S. Truman setti met sum amerikanskur forseti, tá hann í 1952 fekk at vita, at heili 67 prosent av amerikanska fólkinum vóru misnøgd við hann og avrik hansara. Tað var um reppið, at Truman misti metið 22 ár seinni, tá 66 prosent søgdu, at tey vóru misnøgd við Richard Nixon sum forseta og tað, sum hann avrikaði.

Men nú hevur Truman mist metið, tí ein kanning hjá CNN vísir, at 71 prosent av amerikanska fólkinum eru misnøgd við George W. Bush, forseta og hansara hátt at stýra landinum. Bush kann so ugga seg við, at tað eru hóast alt fleiri, sum eru nøgd við hansara avrik, enn Truman og Nixon kundu vísa á. 28 prosent siga seg vera nøgd við Bush. Hjá Truman og Nixon vóru tølini ávikavist 22 og 24.

Tað er serliga kríggið í Irak, sum trýstir umdømið hjá Bush í botn. 68 prosent av teimum, sum CNN hevur spurt, siga, at tey eru ímóti krígnum. 30 prosent taka undir við tí.

*Amerikanarar halda lítið um George W. Bush sum forseta*

*Mynd: Polfoto*

### STUTT SAGT

## Dalai Lama stóra ávirkan

Andaligi leiðarin hjá tibetanum, Dalai Lama, er tann einstaklingur í heiminum, sum hevur størstu ávirkanina. Tað heldur tíðarritið Time, sum á hvørjum ári metir um, hvørjir einstaklingar hava serliga stóra ávirkan. Sambært tíðarritinum er Dalai Lama tann við teirri størstu ávirkanini, og næstur honum er fráfarandi russiski forsetin, Vladimir Putin. Amerikanski forsetin, George W. Bush, er á sjeynda plássi, meðan Barrack Obama, Hillary Clinton og John McCain, sum stríðast um at taka við eftir hann, eru á ávikavist triðja, fjórða og fimta plássi. Ímillum teirra og Bush er kinesiski forsetin, Hu Jintao. Bush kann so ugga seg við, at hann var als ikki á listanum í fjør.

Tað eru ikki bara andaligir leiðarar og politikarar, sum hava ávirkan á fólk og viðurskifti. Tað hava filmsfólk og onnur kend andlit eisini, og sambært Time standa Brad Pitt, Angelina Jolie og Oprah Winfrey á teimum ovastu plássunum á tí listanum.



*Tað hevur stóran týdning, hvat Dalai Lama sigur og ger*

*Mynd: Reuters*

## Týskt í Bretlandi

Týska flogfelagið Lufthansa hevur gjørt avtalu við bretska flogfelagið British Midland um, at týska felagið skal yvirtaka tað bretska. Lufthansa eigur sum er 30 prosent av partapeninginum í British Midland og yvirtekur hin partin innan tvey ár. SAS eigur 20 prosent av British Midland og hevur játtað at selja, og tað hevur aðalstjórin í BM, Michael Bishop, eisini. Hann eigur 50 prosent av felagnum. British Midland er tað flogfelag, sum hevur næstflest lendingarloyvi á Heathrow-flogvøllinum í London.